TEKNISKI SKÚLIN
TÓRSHAVN

# Lærari til hárfríðkanardeildina

Starvið, sum er fulltíðarstarv, umfatar undirvísing av hárfríðkanarnæmingum og SIT-næmingum, og kann eisini umfata undirvísing á øðrum deildum skúlans.

Umsøkjarin skal hava sveinabræv sum hárfríðkari, hava útbúgving innan vakurleikarøkt og hava viðkomandi starvsroyndir innan yrkið. Umsøkjari, sum hevur aðrar viðkomandi útbúgvingar og undirvísingarroyndir hevur fyrimun.

**Løn:**
Lønin verður sambært sáttmála millum Føroya Landsstýri og FTL.

Starvið skal setast 1. oktober 2006.

Skrivlig umsókn við upplýsingum um útbúgving, starvsroyndir og viðmælum skal vera skúlanum í hendi í seinasta lagi 4. september 2006.

Meira fæst at vita um starvið við at venda sær til skúlan, tlf. 30 80 50.

**TEKNISKI SKÚLIN Í TÓRSHAVN**
Marknagilsvegur 75 · Postsmoga 239
FO-110 Tórshavn
Telefon +298 30 80 50 · Faks +298 30 88 51
e-mail: tst@tst.fo

# El-verkfrøðingur/ El-innleggjari

Til teknistovu okkara í Tórshavn verður søkt eftir einum el-verkfrøðingi og einum el-innleggjara til projekterings- og eftirlitsarbeiði.

Tað er ein fyrimunur um tú hevur kunnleika til at arbeiða við teldu við forritum sum Word, Excel, Project og AutoCad.

Skrivlig umsókn við avriti av prógvum, lívsgongdarlýsing (CV), upplýsingum um arbeiðsroyndir og møguligum viðmælum verður at senda okkum innan 4. september 2006.

Lønar- og setanartreytir verða eftir nærri avtalu.

Meiri fæst at vita um størvini við at venda sær til Kristmar E. Johannesen, stjóra á tlf. 222631.

Allar umsóknir verða viðgjørdar í trúnaði.

**Spf. KJ Elráð Ráðgevandi verkfrøðingar**
Mikinesgøta 5, 2. hædd · FO-100 Tórshavn
Tlf. +298 35 76 20 · Fax +298 35 76 21
e-mail: kej@kje.fo

# Gøtu kommuna søkir starvsfólk til Dagstovnin

**1 pedagogstarv á 30. t. viku. At byrja 15. september 2006**
**1 pedagogstarv á 35 t. viku. At byrja 15. oktober 2006.**
**1 hjálparfólkastarv 30 t. viku. Starvið er tíðaravmarkað frá 15. sept. 2006 til 6. august 2007.**
**1 avloysara til arbeiðið tá starvsfólk eru sjúk og annað.**

Dagstovnurin er normeraður til 78 barnagarðspláss, lat upp í februar 2000. Stovnurin er við Gøtugjógv og liggur í hugnaligum umhvørvi.

**Í dagliga arbeiðinum leggja vit m.a. stóran dent á:**
- at børn og starvsfólk trívast og eru í menning
- at hava gott samstarv við foreldur og starvsfólk
- at skapa álit og tryggleika, bæði fyri foreldur og børn
- at virða tað einstaka barnið í bólkinum.

**Vit ynskja:**
- at tú hevur góð samstarvsevnir
- at tú hevur hug og áræði at skapa ein fjølbroyttan og tryggan gerandisdag
- at vera við til at mynda og menna tað pedagogiska umhvørvið.

**Lønarviðurskifti:**
Lønin er sambært sáttmála millum Føroya Pedagogfelag og Føroya Kommunala arbeiðsgevarafelag. Um eingin pedagogur søkir, verða hjálparfólk sett tíðarmarkað.

**Meira fæst at vita**
um størvini við at ringja til Torgerð Hansen, leiðara á fartelefon 218012.

**Umsóknir**
saman við prógvum og møguligum viðmælum skulu vera okkum í hendi í seinasta lagi mánadagin 11. september 2006 kl. 10.00.

Sendast til:
**Dagstovnin í Gøtu**
Vaktarhúsvegur 1
Postboks 32 · 511 Gøtugjógv

Götu Kommuna

# Jørð til sølu í Funningi

Tvær gyllin og 16 skinn. Fremra gonga í Líðini og 3352 fermetrar innangarð. Verður selt samlað.

**Tlf. 422267**

# Farloyvisstarv

**Runavíkar kommuna søkir eftir starvsfólki til Heimið á Mýrunum í Runavík.**

Talan er um eitt farloyvisstarv í tíðarskeiðinum frá 15. september ella skjótast gjørligt til 30. juni 2007. Starvsbrøður 0,6125.
Arbeitt verður í skiftandi vaktum.

**Krøv:**
- hevur viðkomandi útbúgving ella hjálparfólk við áhuga ella royndum fyri demensrøkt.
- hevur áhuga fyri røkt av minnisveikum fólkum
- hevur hug og hegni at vera um minnisveik fólk
- hevur góð samstarvsevnir
- hevur gott yvirlit og megnar at skipa dagin eftir tørvinum hjá búfólkunum
- er nýhugsandi og hevur hug og árræði at skipa fyri dagligum virksemi fyri tey minnisveiku

**Vit kunnu bjóða:**
- eitt starvsumhvørvi, har tú kanst gera tína áskoðan galdandi og verða við til at menna umsorgan og røkt
- góða innleiðslu
- góðar møguleikar til at brúka tíni skapandi og ígongdsetandi evni
- eitt heimligt og hugnaligt umhvørvi, hvar ið hvør einstakur kann kenna seg væl

**Setanartreytir:**
Løn og setanartreytir smb. sáttmála ímillum avvarðandi yrkisfelag og Fíggjarmálaráðið.

Nærri fæst at vita um starvið við at tosa við Maibritt Jacobsen, leiðara á tlf. 477080 ella 448034.

Umsókn við avriti av prógvi v.m. skal sendast til:



**Heimið á Mýrunum**
Mýravegur 26
620 Runavík

**Umsóknarfreist:** 2. september 2006



# HALLÓ!!!

**NÚ BYRJA VIT AFTUR AT DANSA LINEDANCE Í GLÆMUNI Í KVÍVÍK**

Ætlanain er at hava eitt skeið fyri byrjarar mánakvøld frá kl. 19.00-20.30 og eitt skeið fyri royndar dansarar frá kl. 21.00-22.30.

Tilmelding á 221262 og 227701.

Skeiðið er 8 mánakvøld og kostar kr. 350,- og byrjar 4. september.

**BYGDARFELAGID GLÆMAN**